## VIÐMERKINGAR

# Vanrøkt hjá fjølmiðlunum hóttir fólkaræðið

**Óvitinskapur hjá fólkinum og vanrøkt hjá fjølmiðlunum gav politikarunum fríar ræsur at seta fólkaræðið í Føroyum til viks**

**Rúna Sivertsen**
*www.runa.fo*



Ein av mest týdningarmiklu uppgávunum hjá fjølmiðlunum er at varpa ljós á mál á ein slíkan hátt, at fólk skilja málini og kunna luttaka í kjakinum.

Hetta er grundarsteinurin undir fólkaræðinum.

Hesa skyldu sviku føroysku fjølmiðlarnir so dyggiliga, tá málini um yvirtøkulógirnar og uttanríkispolitisku heimildirnar vóru til viðgerðar í tinginum.

Tey bæði stóru tíðindabløðini í Føroyum, Sosialurin og Dimmalætting, skulu eitast at vera politiskt óheft. Men leiðslurnar og nevndirnar á báðum bløðunum vísa týðiliga, at tey enn eru sterkt litaði av teimum flokkum, tey í sínari tíð vóru málgagn fyri.

So frá teimum kanst tú ikki rokna við eini ópartískari lýsing av politiskum málum, sum hesi.

Tað tekur tíð at seta seg inn í slík torskild mál, og skulu tey lýsast við skili, er neyðugt at seta fólk av til arbeiðið. Tað er tí ein raðfesting hjá tíðindaleiðslunum, hvørji mál tey vilja nýta orku upp á.

Haraftrat noyðast bløðini í stóran mun at hugsa um, hvat selur blaðið - og torskildar politiskar greinar eru ikki "bestseljarar".

Men teir báðir almennu fjølmiðlarnir, Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya, eiga sambært lógini at leggja dent á upplýsing, sakliga og óheft.

Men eisini teir sviku!

**Ósvaraðir spurningar**

Sama, hvørja støðu vit hava til málini, sita helst tey flestu við sama spurningi, sum Høgni Hoydal setir í grein í bløðunum í síðstu viku:

*"Hvussu ber tað til, at eitt mál um at selja rundstykkir fær drúgvari og meira nágreiniliga viðgerð á tingi og í fjølmiðlunum, enn eitt mál um at selja eitt heilt fólkaræði?".*

Eg sigi ikki, at fólkaræðið er selt. Hesi málini eru nevniliga so torgreidd, at sjálvt stjórnmálafrøðingar eru ósamdir á máli um spurningin.

Men sambært tí, sum Høgni skrivar, so hevur løgtingið samtykt:

*- at føroyingar kunnu bert gera avtalur við onnur fólk og lond sum fulltrúar vegna danska ríkið*

*- at føroyingar kunnu ikki gera avtalur, ið stríða móti donskum áhugamálum*

*- at føroyingar hava ongan avgerðarrætt í verju- og trygdarmálum*

*- at fólkarættarligir sáttmálar skulu gerast í navninum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne"*

*- at Danmark skal spyrjast bæði undan, meðan og aftaná, at ein avtala verður gjørd*

*- at Danmark kann siga upp allar sáttmálar og seta aðrar í gildi, sum teir halda vera best hóskandi fyri Føroyar, uttan at spyrja føroyingar eftir.*

**Sviku fólksins álit**

Tað eru viðurskifti sum hesi, ið fáa meg at ivast stórliga í um tað, sum tingið hevur samtykt, man verða tað besta fyri Føroyar.

Eg og flestu føroyingar við mær eru í iva og ørkymlaði av hesum málum.

Eg vænti mær ikki hjálp frá politikarunum at fáa greiðu á hesum. Teir hava svikið mítt álit í handfaringini av hesum málum.

Tó hevði eg roknað við, at fjølmiðlarnir fóru at gera sína skyldu og upplýsa Føroya fólk, um hesi fyri landið so týdningarmiklu mál.

# Demokrati

**Mannbjørn Jacobsen**

Seinastu árini hava eg fingið mær fyri, at skimla føroysku bløðini ígjøgnum. Nógv hendir á stýrisskipanarøkinum, sum eg havi blandað meg nakað uppí í bløðunum, uttan at nakar hirðir at svara aftur sum vant.

Ein, eg fast havi stóra nyttu av at skimla eftir, er Sækaris Wang. Hann er altíð gløggur og enntá stuttligur at lesa. Aðrir eru Finnbogi, Høgni sjálvandi, Tobbi osfr. Hesir eru greiðir og gløgtmetandi menn, sum eg ongantíð ivist í, hvar teir standa. Tó er onkuntíð okkurt, sum eg ivist í er í skemti ella álvara av framførslum, ella skal tulkast grovligari. Tað verður uppklárað við endursvari vónandi.

Nú í dag læs eg ein av vanligu væluppløgdu greinunum hjá Sækaris, sum hann kallaði Eitt valdømi.

Har preiar hannn gjøgnum søguna um ymiskar samfelagsskipanir ymiskar í tíð og stað, so langt sum frá eitt eiti av einari valskipan í miðøldini í Føroyum, katólsku kirkjuni við pávanum á odda, ensku valskipanina og donsku, sum hann sigur er ófullfíggjað demokratisk.

Nú ivist eg í um alt ikki bara er ein definisjónsspurningur, tá Sækaris sær allar hesar sum demokratiskar, og hann í veruleika meinar við fólkaliga umboðandi á einhvønn hátt. Val av einum mykinesmanni, har bara ein stillar upp, ella tey bara finna fram á ein klókan mann, sum eingin hevur nakað ímóti, hevur ikki nógv við demokrati at gera, sum vit tosa um í dag. Eingin samfelagsskipan hevur nakrantíð verður til, sum ikki hevur eitthvør val innií, á tann hátt vóru valskipaninar meir demokratiskar fyrr, tí kongarnir vóru valdir, kjósaðir, út av kongsevnum, har skil var í metingini. Hetta er ikki demokrati í dag. Alt slíkt er siðvunnin samfelagsskipan.

Pávavalið fær Sækaris eisini at fara demokratiskt fram, hóast tað er einasta eftirverandi leivd av skipanini í upplýsta einaveldinum, og fyrimyndin fyri førarskipanina hjá Hitler og samsvarandi hjá Mussolini. Hon hevur skift eitt sindur gjøgnum tíðina. Men at ein savning av kardinalum, sum pávin sjálvur hevur valt, sum so velja hann og senda hvítan royk út gjøgnum ljóðaran á Vatikaninum, svartan meðan teir ivast og eru ósamdir, skal vera demokrati, er ikki rætt at siga. Sækaris sigur her bara, at eitthvørt val er demokrati. Nærri framferðarhátturin í valinum í oligarkisku skipanini er sjálvandi demokratisk, meirilutin av kardinalunum ræður. Er pávin valdur, ræðir hann sum Ludvík fjúrtandi, bara undir gudi, við ráðgevarum sær við lið.

Enska parlametariska skipanin sigur Sækaris er demokratisk á sama hátt sum pávakirkjan. Eitt umboð fyri hvørt valdømið í parlamentið. Hetta framheldur í fyrrverandi hjálandaríki teirra, íroknað USA. Kjarnan í bretska demokratinum er ikki, at ein umboðar hvørt valdømi, men at tveir stillað upp, minst, harav bara annar verður valdur í tingið.

Stuttliga dømi um val í Danmark, so seint sum í tíð I.C. Kristensen skal helst fatast í skemti. Bóndafasisma er vørumerkið fyri flokkin, hann umboðandi, Venstre, av av vi finder ud af det, eitt uppskot, so okkurt róp og ein sang, so er hann tó valdur.

Landstingið, danska yvirhúsið til 1953, var ikki valt demokratiskt, fólkatingið var. Fleiri har vóru útpeikaðir, m.a. føroyski umboðsmaðurin av løgtinginum, uttan beinleiðis val.

Eg fekk ikki heilt við, um Sækaris er hugaður fyri einumm valdømi. Eg vóni tað ikki, men ein grein er eftir um evnið.

Nógv av hesum byggir møguliga á misskiljingar um orð Sækariasar. Eg havi lisið fyrra part gjølla nokk.

# Miðnámsútbúgvingar og 1+1=2

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

**Tey ungu hava rætt og samfelagið hevur skyldu til at syrgja fyri at okkara ungu fáa útbúgvingar. Tað er alneyðugt, bæði fyri at tey ungu og samfelagið skulu mennast.**

Eftir eitt tað ríkasta tíðarskeið í Føroya søgu frá 1998 til 2003, standa mong ídag við einum trupulleika. Fleiri av okkara ungu sleppa ikki inn til eina miðnámsútbúgving.

Studentaskúlin í Hoydølum, ið longu trongdi til útbygging í 1970-unum, er nú heilt niðurslitin, og onki broyttur, annað enn at hølisviðurskiftini bert eru vorðin verri, og skúlin er heilt yvirfyltur av næmingum.

Eg haldi, at harmiligt er, at studentaskúlin datt niður ímillum, øll árini ímeðan Tjóðveldisflokkurin sat við hesum málsøki. Men tá var bert loysing á skránni. Skerjing av ríkisveiting. Tí 1+1 er ikki 2, sambart teimum. Annars lærdi eg í barnaskúla, í Hoydølum og á Universitetinum, at 1+1=2.

Í Tjóðveldis búskaparfrøðini er alt so nógv meira kompliserað, at tað bert eru tey heilt fáu og sera, sera klóku í fata tað. Har er 1fkr+1fkr=2000fkr, men 1dkr +1dkr=minus 20000 dkr. (Samstundis er 1 fkr=1dkr) Hendan nationalistiska búskaparfrøðin, er ikki løtt at fata hjá øðrum enn tjóðveldisfólkum og hevur enn einaferð ført við sær, at undirskot er á Landskassarokniskapinum. Peningurin, ið vit høvdu til at byggja samfelagið út við, millum annað studentaskúla, var mettur so skaðiligur, at hann nú er í Danmark har hann undarliga nokk ger gagn. Higartil hava vit mist 1 millión dkr um dagin ella tilsamans einar 1500 milliónir dkr.



Um hesin peningur var so skaðiligur, vildi ein rokna við, at yvirskotið á fíggjarlógini vaks sera nógv í fkr. Men tað hava hvørki vit ella loysingarfólk sæð - og tað rokni eg við at vit eru samt um.

Vit í Sambandsflokkinum fara at royna at bøta um viðurskiftini á okkara miðnámsskúlum. Og eg fari samstundis at heita inniliga á øll tykkum sum ganga í barnaskúla, á miðnámsskúla, eins og á allar føroyingar annars. Gloymi ongantíð, at 1+1=2. Óansæð hvat sjálvútnevnd búskapargeni úr Tjóðveldisrørsluni siga.

Fyri at fáa pening til at byggja m.a miðnámsskúlar til ungdómin, mugu vit royna at finna inntøkukeldur. Men ikki hækka skattir og avgjøld, ið longu nú eru drepandi.

Tað er avbjóðingin fyri okkara samgongu, vinnulívsfólk og sølufólk okkara.

# Manglandi visiónir fyri føroyska samfelagið

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*



Nú staðfest er, at ikki allir egnaðir næmingar verða tiknir upp á miðnámsútbúgvingunum í Føroyum, má hetta sigast at vera sera óheppi og lítið visionert fyri Føroyska samfelagið.

Skulu vit gera okkum vónir um at lyfta føroyska samfelagið upp á eitt hægri vitanarstøði og satsa okkara framtíð upp á vælútbúgvið fólk, ber als ikki til at leggja forðingar í vegin fyri okkara ungdóm og avskera hann frá tí útbúgving, sum skal vera við at geva samfelagnum tað neyðuga lyftið fyri at bera framtíðar vælferðina.

Hetta kann metast við at gera eina veltu, har eplini ikki eru komin í jørðina um várið, tá so heystið kemur og fruktirnar skulu fáast úr jørðini, eru ongar fruktir at heysta. Og júst tað er vandamálið, vit koma at mangla útbúgvið fólk at byggja okkara framtíð á.

Eisini tann staðfestingin, at skúli hækkar upptøkukrøvini, haldi er vera sera óheppi. Fyrst og fremst fyri næmingarnar, sum ikki eru kunnaðir um støðuna frammanundan, og eisini fyri hagtølini, sum nú ikki vísa øll sum veruliga eru egnaði, men nú upptøkukrøvini eru umdefinerað, koma hesi at standa sum umsøkjarar sum ikki vóru egnaði. Tað vil siga at í veruleikanum eru nógv fleiri enn tað, sum tølini vísa, sum ikki sluppu inn á eina miðnámsútbúgving.

Samstundis sum samgongan veitir skattalætta til tey ríku, hevur man ikki fíggjarorku at geva ungdóminum neyðuga útgangsstøðið til framtíðina, og á tann hátt gerst alt tos um visión 2015 innantómur orðafloymur.